

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 05 - 2013

# Byggja heimsins største vatnorkuverk í Afrika

Grand Inga-verktætlanin skal kunna veita elorku til helvtina av afrikanska heimspartinum skrivar Teknisk Ukeblad. Heimsins núverandi største vatnorkuverk finst í dag í Kina. Tað nevnist Three Gorges (Tríggjar Gjáir) og hevur eina framleiðsluorku uppá 22.500 MW. Ì mong ár hava verkfrøðingar droymt um at troyta vatnorkuna í eini á í Kongo, tí næststørstu í Afrika. Her kann ein byrging gerast, sum kann hýsa heimsins størstu vatnbyrging. Tað er búskarpaligi vøksturin og økti eftirspurningurin eftir elorku, sum nú er orsøkin til, at myndugleikarnir í Kongo hava tikið fram aftur útbyggingarætlaninar fyri Ingafossarnar. Grand Inga gevur møguleika fyri at byggja orkuverk við eini samlaðari orkuframleiðslu uppá 40 000 MW, sum er tvífalt so nógv sum heimsins største vatnorkuverk í Kina. Hetta svarar, sambært Teknisk Ukeblad, til eina orkuframleiðslu frá 20 kjarnorkuverkum við 2000 MW hvørt. Heimsbankin, Afrikanski Menningarbankin, teknologar og íleggjarar møttust herfyri í París fyri at tosa um fíggingina av hesi risa verktætlan. Grand Inga verkætlanin kann veita orku til helvtina av tí afrikanska heimspartinum verður sagt í eini frágreiðing eftir Parisfundirnar. Stjórnin í Kongo hevur longu lagt fram fyrstu útbjóðingina av einum parti av útbyggingini, Inga 3, sum fer at geva 4.800 MW. Longo nú hevur Suðurafrika sagt seg vilja keypa 2500 MW av orkuni frá Inga 3. Longu nú eru byrgingar og vatnturbinur í Kongo og verða hesar eisini partur av komandi útbyggingunum. Um alt gongur eftir ætlan, verður spakin settur í á heysti 2015. Samlaða lidna útbyggingin er mett at kosta 400 milliardir kr. Myndir frá Kongo, har ætlanin er at byggja heimsins største vatnorkuverk. Frá heimsins største vatnorkuverki í Kina